gult4 cyan4 magenta4 svart4



NØVN Í VIKUNI

# Sjónleikari stjóri í Sjónvarpi



Fyrsta stóra starvsetanin hjá nýggja landsstýrismanninum í mentamálum Óla Holm var at seta nýggjan sjónvarpsstjória og hetta gjørdi hann seinnapartin mikudagin. Nýggji sjónvarpsstjórin eitur Mikkjal Helmsdal, er mest kendur í Føroyum sum sjónleikari, men hevur longu nú drúgvar royndir í leiðslu. Seinastu 6 árini hevur Mikkjal burturav arbeitt við leiðslu, stýring og organisatión innan mentanarøkið. Síðani 1997 hevur Mikkjal verðið stjóri fyri Nordens Institutt í Álandi, sum er ein mentanarstovnur undir Nordisk Ministerråd. Frá 1995 til 1997 virkaði Mikkjal sum fyrisitingarleiðari og framleiðslustjóri hjá sjónleikarabólkinum Grímu.

Mikkjal Helmsdal er 37 ára gamal. Mikkjal Helmsdal hevur útbúgving sum cand.mag. í leiklistarfrøði og norðurlendskum máli og bókmentum.

Mikkjal Helmsdal tekur við stjórastarvinum í Sjónvarpi Føroya tann 15. august 2001.

# Sune Joensen 70 ár



Í gjár, 28. juni, fylti Sune Joensen, fyrrverandi stjóri á Brunatrygging, 70 ár. Suni er føddur í Sandvík. Og nú hann er vorðin 70 ár, búgva Poula og Sune á Flatnagerði 32 í Havn. Og her hava tey nú búð í mong ár.

Sjáldsamt, tað orðið er ikki so óhóskandi at brúka í tí viðfangi, at nevna Suna, tí sjáldsamt er at møta manni, sum hevur verið so virkin og livandi sum hann, og tað er at siga higr til dags.

Tað kann vera reksað upp nógv, sum hann hevur lagt út hondum ella sum hann hevur fingið frá hondini.

Hansara lívssøga hevur veirð sum hjá mongum Føroyasyni. Hann fór til skips og hann kom eisini til Havnar, var á Skipasmiðjuni, men so verður hann meiri støðufastur, er 18 tá hann kemur á Brunatryggingina, tað var í mars 1950, og har var hann tey komandi mongu árini, endaði sum stjóri til fyri fáum árum síðani, tá hann legði frá sær.

At Sune er skrivandi maður hava vit so mangan sæð og hoyrt. Hann hevur skrivað rættuliga fjøllbroytt frá siðalívi, frá heimbygdini, um bygdalív og skipslívi. Ansin fyri fuglalívinum kenna vit frá filmupptøkum hann hevur gjørt úr fuglabjørgunum í Skúvi, rættiliga fimur má hann hava verið við filmstólunum.

So kundi verið nevnt, at hann fyri mongum árum síðani gav út stenografilærubók á føroyskum.

Umframt eigur lutur hansara í KFUM at verða nevndur – enn er hann ein aðaltátturin í tí frálíka arbeiði, gjørt verður í Varðmenn-tiltakinum, eldratátturin hjá KFUM.

Og so er at nevna, at Sune higartil hevur verið túr á fiskileið undir Íslandi á sumri hvørt ár.

## Ráðstevna um útbúgving og trygd á stjónum

SJÓMANSSKAPUR
*Tíðindaskriv*

Í hesum døgum er norðurlendsk rástevna, Normar, hildin í Føroyum. Ráðstevnan hevur verið hildin í Havn, Klaksvík og á Viðareiði. Normar er ein ráðstevna, har útbúgving av sjófólki verður viðgjørd. Umboð fyri sjómansskúlar og ráðharrastovnar, ið umsita skúlarnar, luttaka á ráðstevnuni. Luttakaralondini eru Áland, Danmark, Finnland, Grønland, Ísland, Svøríki og Føroyar. Ráðstevnan verður hildin á hvørjum ári, og skifast londini um at skipa fyri ráðstevnuni. Á ráðstevnuni í ár hevur serligur dentur verið lagdur á at viðgera, hvussu útbúgvingarskipanirnar kunnu skipast í framtíðini, og trygd á sjónum hevur eisini verið eitt av evnunum.

Føroya Sjómansskúli og Maskinmeistaraskúlin skipa fyri ráðstevnini, sum endar í dag, saman við Mentamálastýrinum

## Tøkk



**Tummas Rúnálvsson í Innistovu**

føddur 27. juli 2000 –
andaðist á Ríkissjúkrahúsinum 20. apríl 2001.
Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á einhvønn hátt stuðlaðu og styrktu okkum gjøgnum sjúkraleguna og við deyða okkara elskaða lítla soni.

Ein serstøk tøkk til Sjúklingahotel Tórshavn, Ríkissjúkrahúsið, starvsfólk og búfólk.

Takk til okkara kæru familju, ætt, vinir og kenningar og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Takk til fjølmiðlarnar, sum við okkara rópan um hjálp fekk føroya fólk at stuðla okkum við peningagávum, bønum og heilsanum so okkara elskaði sonur kundi fáa ta hjálp okkum stóð í boði.

Okkara elskaði sonur sovnaði stillisliga inn og liggur nú og hvílur saman við beiggja sínum í Filskov kirkegård.

TAKK!

**Maiken og Rúnálvur**

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Løgmaður vil loysa marknaósemju við Ísland

**Eftir at Føroyar og Bretland gjørdu semju um miðlinjumark millum londini verður nú av álvara farið undir aftur at loysa eina aðra marknaósemju, hana við Ísland**

MARKNAÓSEMJA
*Jan Müller*




*Marknaósemjan millum Ísland og Føroyar snýr seg um gráa økið millum londini. Ósemja er um út frá hvørjum punktum miðlinjan skal setast.*

Tá samráðingar vórðu við bretsku stjórnina um at fáa loyst marknaósemjuna gjørdi løgmaður av at leggja hitt óloysta marknamálið, ósemjuna við Ísland, á hillina fyribils.

Nú ætlar løgmaður sær at taka málið framaftur og at viðgera hetta aftur í allari politisku skipanini, tvs. bæði millum flokkarnar, í Uttanlandsnevnd og við vinnuna.

Løgmaður hevur roynt at lýst málið so væl tað ber til og hevur roynt at funnið fram til, um ikki tíðin er búgvin til at fáa málið aftur á samráðingarborðið. Um tað fer at eydnast at fáa avgreitt hetta málið í hesum valskeiðnum vil tíðin vísa, men løgmaður ætlar sær at royna. Hann ger vart við, at hetta er ikki eitt mál, sum verður tikið upp í sambandi við íslendsku forsetavitjanina.

Íslendski uttanríkisráðharrin er boðin av løgmanni at vitja í Føroyum seinni í ár, og tá verður marknamálið helst tikið upp.

Trætan snýr seg um eitt lutvíst stórt øki miðskeiðis millum londini, eitt øki, sum í dag er eitt grátt øki, tvs. at bæði londini kunnu fiska har. Men skuldi tað hent, at oljufeløg vilja leita eftir olju í einum slíkum øki, so ber tað ikki til fyrr enn markið liggur heilt greitt. Tað er annars politikkurin hjá bæði Íslandi og Føroyum at hava greið mørk, og nú Ísland og Føroyar hava fingið mørkini við ávikavist Grønland, Noreg og Bretland uppá pláss, er eftir markið millum Ísland og Føroyar. Ósemjan snýr seg um, hvat miðlinjan skal vera og út frá hvørjum hon skal ásetast. Íslendingar vilja áseta hana út frá Hvalbaki, sum er óbygdur klettur. Føroyar góðkenna ikki Hvalbak fyri ásetan av miðlinju.

Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur, at støðan minnir um hana millum Føroyar og Bretland og vísir á, at tað krevjast liðiligheitir frá báðum síðum fyri at finna eina loysn. –Vit eru innstillaðir uppá at fáa eina loysn sigur løgmaður.

### Rockallslættin

Herfyri var fundur millum Oljumálastýrið og umboð fyri flokkar og landsstýrið, har eisini hitt óloysta marknamálið – rættindini til stóru økini sunnan fyri, Rockallslættan - varð til viðgerðar. Tá varð greitt frá, hvussu tað málið stendur. Har eru tað fleiri lond, Føroyar, Ísland, Bretland og Írland, sum gera krav uppá eitt risastórt øki, sum í framtíðini kann fáa sera stóran búskaparligan týdning. Av tí at eingin loysn er funnin á hesum málinum ber t.d. ikki til hjá oljufeløgini at bora eftir olju og gassi har. Fyrst má ein semja gerast um, hvør eigur rættindini til økið ella partar av tí. Løgmaður sigur, at her væntar enn at gerast eitt stórt arbeiði. Frá føroyskari síðu skal stórt fyrireikingararbeiði gerast fyri at kunna gera síni krøv galdandi. Tá eitt úrslit fyriliggur skal man so fara víðari á altjóða støði.




*Fýra lond gera krav uppá stóru økini fyri sunnan, harímillum Føroyar*


